# TILTØK

**Gudstænastur**
**1. sunnudag í føstu**
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Hans J. Joensen, biskupur
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Vestmanna:*** kl. 12.00, Inga Poulsen Dam
***Sandavágur:*** kl. 12.00, David Johannesen
***Eiði:*** kl. 11.40, Skriftamál, kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
***Haldarsvík:*** kl. 12.00, Marjun Bæk
***Hósvík:*** kl. 12.00, altarg., Martin Restorff Jacobsen
***Glyvrar:*** kl. 11.00, altarg., Meinhard Bjartalíð
***Selatrað:*** kl. 12.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Æðuvík:*** kl. 11.00, Jógvan Fríðriksson
***Skáli:*** kl. 11.00, Martin R. Jacobsen
***Gøta:*** kl. 12.00, Mogens Tilsted Christensen
***Fuglafjørður:*** kl. 12.00, Uni Næs
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 12.00, Elsa Funding
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00, Hans Eiler Hammer
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Niels Pauli Danielsen
***Skúlin í Haraldssundi:*** kl. 12.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Hans Eiler Hammer
***Fámjin:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech
***Tvøroyri:*** kl. 14.00. Familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech. Eftir gudstænastuna bjoðar sunnudagsskúlin til eina hugnaløtu í missiónshúsinum
***Hvalba:*** kl. 12.30, altarg., Ólavur Rasmussen
***Vágur:*** kl. 11.00,
***Sumba:*** kl. 12.10, Patrick de Neergaard

**Føstugudstænastur**
**Sunnudagin 5. mars**
***Funningsfjørður:*** kl. 16.00,
***Elduvík:*** kl. 17.15, Emil Olsen
***Kvívík:*** kl. 17.00,
***Vestmanna:*** kl. 19.00, Martin Restorff Jacobsen
***Sandavágur:*** kl. 18.00, Elsa Funding
***Kunoy:*** kl. 19.00,
***Árnafjarðar kirkja:*** kl. 20.30, Jógvan Fríðriksson

**Matine í Christianskirkjuni**
Leygardagin kl. 11.30 Matine.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Bíbliugransking og barnabíbliutími, kl. 11.00 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
*Altjóða kvinnubønardagur* verður í ár hildin í Evangeliihúsinum fríggjakvøldið 3. mars kl. 19.30, har allar kvinnur kunnu vera við. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Leygardagin kl. 11.40 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni. Aftaná messu verður kirkjukaffi. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
www.katolsk.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Sunnudagin kl. 11.00 Gudstænasta v/ Hendrik Olsen og ikki sum áður lýst kl. 18.00. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Mánadagin kl. 17.15-18.00 venur Barnakórið. Kl. 20.00 Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.
Páskastevnan verður í Oasuni í døgunum 13.-17. apríl.
www.oasan.fo

**Lívdin**
***Í Hoyvíkar skúla:***
Fríggjakvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti í Hebron á Argjum, saman við teimum ungu har.
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum luttekur Bo Wallenberg frá »Skandinavisk Børnemission«. Kl. 11.30 Steðgur við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 er evnið »Sannleikar úr Rómbrævinum - Trældómur og frælsi (5:20-6:2)« talari verður Jógvan Z. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00. Barnaansing er undir møtinum. Møtini kunnu ikki hoyrast á netinum í løtuni.
www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin Alheims kvinnubønardagur í Evangeliihúsinum.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti.

**Altjóða Kvinnubønardagur**
Altjóða kvinnubønarfundir verða í Evangeliihúsinum í Havn, Soli Deo Gloria í Klaksvík og Frelsunarherinum í Vági fríggjakvøldið 3. mars kl. 19.30. Offur verður til hjálpararbeiði úti í heimi.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 20.00 Undirvísing v/ Adu Bruynes - evnið: Sex and Dating. Kl. 19.30 Altjóða kvinnubønardagur í Evangeliihúsinum.
Leygardagin kl. 10.00, kl. 14.00 og kl. 20.00 Undirvísing v/ Adu Bruynes - evnið: Sex and Dating.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta v/ Jussi Korvajarvi, kl. 11.50 Barnagudstænasta.
Mánakvøldið kl. 20.00 Felags bønarfundur í Oasuni.
Týskvøldið byrjar møtirøð í Kelduni við Rodney H. Brown. (Sí lýsing aðrastaðni í blaðnum.)
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16.30 Bønarløta fyri kvinnur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Jógvan Garðsá. Effata av Strondum syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Fríggjadagin kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 Møti, Páll Poulsen talar um Tabernaklið - fyrri partur. Mánadagin kl. 19.00 BeTwix, tiltak fyri ung í aldrinum 5.-7. flokk.
www.hebron.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni og sunnukvøldið kl. 18.00 Møti í missiónshúsinum v/ Sigurd Syderbø.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjakvøldið kl. 19.30: Alheimskvinnubønardagur í Evangeliihúsinum. Ynskir nakar KFUK-ari bil, vinarliga sigið frá.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Altjóða Kvinnubønardagur, kl. 19.30 MiniSalt hjá Tórun og Eyðun Miðberg, kl. 20.00 Ungdómsmøti hjá Finnur Carlsen.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jaocbsen talar, kl. 18.00 Møti við Jussi Korvajarvi frá Revival Ministries International. www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ breyðbróting.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Møti. Umboð fyri Skandinavisku Barnamissiónina greiða frá teirra virksemi. Ungdómskórið í Vágum og Lovinda Halgaklett syngja.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti. Nýggjur kvinnubólkur syngur. Barnaansing. Innsavnan til húsið. Aftaná verður felags náttverði.

**Filadelfia, Miðvágur**
Leygardagin kl. 16.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla., Theodor Petersen talar.

**Missiónsvika í Hósvík**
Fríggjadagin kl. 20.00 Møti í bygdarhúsinum v/ Meinigheitskórinum. Innsavnan til gøtubørn í Kiev.
Leygardagin kl. 20.00 Møti í bygdarhúsinum, ungdómsmøti við luttøku úr Leirvík.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti í kirkjuni, Sangur við Jónhildu og Gulak. Tala við Regin Høgnesen. Innsavnan til Heimamissiónina.
1/2 tíma áðrenn møti verður bønarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini. Eftir møtini verður drekkamuður.

**Skandinaviska Barnamissiónin**
Hjartaliga vælkomin til møtini við Bo Wallenberg, leiðara av Skandinavisku Barnamissiónini og Lyudmilu Lonyuk, leiðara av Skandinavisku Barnamissióni í Ukraina á hesum støðum: Fríggjakvøldið kl. 21.00 Konsert í Læraraskúlahøllini, Angela skipar fyri. Leygarkvøldið kl. 20.00 Miðvágs Missiónshús, Lovinda Halgaklett og ungdómskórið syngja.
Sunnudagin kl. 10.30 Lívdin í Hoyvík, Jannet Olsen syngur.
Sunnukvøldið kl. 19.00 Ebenezer í Tórshavn, Sangbólkur luttekur.
Mánakvøldið kl. 20.00 Frelsunarherurin í Vági.
Guð er kærleiki.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
**Missiónsvika verður í døgunum 27. feb. til 5. mars.**
Fríggjakvøldið kl. 20.00, talari: Marjan K. Nielsen, Nes, sangur: Taborkórið. Innsavnan til arbeiðið hjá Heimamissiónini og til húsið.
Leygardagin kl. 16.00 Barnamøti, heimligar kreftir. Drekka aftan á.
Kl. 20.00 Møti, talari: Regin Olsen, sangur: Ungar gentur frá Meinighietshúsinum í Havn.
Hvørt kvøld verður bønarløta í ungdómssalinum áðrenn møti kl. 19.15, tó sunnukvøldið kl. 17.15. Hvørt kvøld verður drekka eftir møti.
Barnaansing verður leygar- og sunnukvøldið meðan møti er. Ungdómsløta verður eftir møti fríggja-, leygar- og sunnukvøldið v/ luttøku av dramabólki og ungdómskórinum.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19.00 Møti við Una Næs. Evni: Týdningurin av bíbillesnaði. Innsamling til húsið. Aftaná møti verður drekka og hugnalig samvera.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 18.00 Møti. Miku- og fríggjamorgun kl. 6-7 Bønarmøti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Berøa, Saltangará**
Fríggjadagin kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli, kl. 12.45 Familjumøti, máltíð aftaná.
Mikudagin kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 19.30 40 daga ráðstevna av bakkastokki, øll kunnu vera við.
Sunnudagin kl. 17.00 Festmøti, evnið: Hvat er endamálið við lívinum. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Sjómanskvinnuringarnir í Runavík og á Strondum**
koma saman týskvøldið kl. 19.30 í missiónshúsinum á Strondum. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 við sjómanstrúboðaranum Torleif Johannesen. Filmur verður vístur frá arbeiðinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sudanringurin kemur saman týsdagin 7. mars kl. 19.00. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Barnakórið venur aftaná. Kl. 18.00 Møti. Innsavnan til húsið.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Marius Jacobsen og kl. 21.00 Ungdómsmøti við Eivind Mouritsen. Evnið: Er heimurin skaptur? Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við ungdómsnevndini, kl. 21.00 Ungdómsmøti við Pól Johannesen.
Mánakvøldið 6. mars møtist Sjómanskvinnuringurin kl. 20.00 Øll hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Altjóða kvinnubønardagur.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Magnus Simonsen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Jógvan Petersen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Fríggjadagin kl. 20.00 Møti v/ Hans Paula Højgaard, Rituvík, Jónhilda og Gullak syngja.
Leygardagin kl. 20.00 Møti v/ Gullak og Jónhildu Hansen, Rituvík, sum tala og syngja.
Sunnudagin kl. 15.00 Familjumøti. Kl. 18.00 Møti v/ Thomas Juul Askham, Tórshavn, Manskórið á Sandi syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli vegna barnagudstænastu í Tvøroyrar kirkju. Møti kl. 18.00 er avlýst vegna missiónsviku í Hvalba.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin vikuskiftismøtir v/ Torbjørn Láadal, Steindor Hjaltalin og Palla Petersen. Kl. 19.00 Evangel. møti, kl. 22.00 Flipp á Herstøðini (ungdómsmøti).
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti har Torbjørn, Steindor og Palli luttaka. Øll eru vælkomin.
Mánadagin verður eingin guitarskúli. Skandinav. Barnamissión: Møti kl. 20.00, Bo Wallenberg talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
**Missiónsvikan verður í døgunum 28. februar til 5. mars.**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Kórið av Toftum luttekur við sangi og talu.
Sunnukvøldið kl. 20.00 Magnus Hansen og Jóanes Mortensen tala, kórið úr Porkeri syngur.

**Brúdleyp**
25. mars kl. 13.00 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Annfinn Thomsen, Sumba, búsitandi í Runavík, og Astrid-Maria í Lág, Strendur, búsitandi í Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn mánadagin 13. mars á tlf. 448437, 224117, 448342, 258730.

1. apríl kl. 15.00 giftast í Skála kirkju, Suni Justinussen, Leirvík og Elly Mikkelsen, Skála. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. mars á tlf. 582020/443207 ella 257019/441632.

Leygardagin 1. apríl kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Vár í Gong og Johann Behrens, Tórshavn. Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 15. mars á tlf. 311531, 212235, 211531 ella á teldupost jib@post.olivant.fo

Leygardagin 1. juli giftast Jacobina Norðberg Petersen og Martin André Assentoft. Vígslan verður kl. 14.00 í Sankt Markus kirkjuni á Frederiksberg. Veitslan verður hildin í veitsluhølinum í Holdkærs Ager nr. 94, Kastrup, kl. 16.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. +45 32513216, +45 31203216 ella á heimasíðuni www.123hjemmeside.dk/binamartin áðrenn 14. apríl.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 7. mars hava Rósa og Heri Hammer, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við vælkomst, leygardagin 11. mars frá kl. 17.00, Undir Hálsi 33.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 10. mars hava Jóna og Helgi Thomsen verið gift í 50 ár. Tey, ið ynskja at heilsa uppá gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin í Gøtubrá leygardagin 11. mars frá kl. 18.00.

**60 ár**
11. mars fyllir Ellbjørg Davidsen, Tórshavn, 60 ár. Dagurin verður hildin hjá Eyðgerð og Bjarna, Skákið 1 í Kollafirði frá kl. 10.00-17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.